## Fólkafundur í Skopun

Annan hvítusunnudag kl. 15.00 verður fólkafundur í Samljóð í Skopun. Um viðrar verður fundurin hildin á heygnum við Samljóð.

Við á fundinum verða Jákup Reinert Hansen, sóknarprestur, Jacob Vestergaard, landstýrismaður, Óli Breckmann Løgtingsmaður og Jákup Veyhe.

Sungið verður úr Songbók Føroya Fólks.

## Umhvørvisdagur í Sandavágs kommunu leygardagin

Leygardagin 26. mai skipar Sandavágs kommuna fyri árliga umhvørvisdegnum. Byrjað verður í SÍF-húsinum kl. 10 við morgunmati og framløgu av nýggjari ætlan fyri burðardygga menning í kommununi. Síðan verður farið runt um í bygdini at rudda.

Tá liðugt er at rudda verður ábit í SÍF-húsinum og kunning um tilbúgving í húsarhaldinum har fyrstihjálparpakki til vanlig húsarhald verður víkstur.

Tiltakið verður liðugt umleið kl. 14:30.

Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins:

# Rímiligt at kirkjumálaráðharrin er limur

**Tað er einki annað enn rímiligt, at avvarandi landsstýrismaður er limur í fólkakirkjuni, sigur Kaj Leo Johannesen**

FÓLKAKIRKJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sambandsflokkurin er tann flokkur, sum hevur givið týðiligast til kennar, hvar hann stendur í málinum um landsstýrismannin í kirkjumálum, og um hesin skal vera limur í fólkakirkjuni.

Tað stendur greitt, at sambært Stýrisskipanarlógini kann eingin krevja, at nakar er limur í fólkakirkjuni. Eisini einum landsstýrismanni í kirkjumálum stendur frítt at velja, um viðkomandi vil



*Kaj Leo Johannesen heldur tað ikki tað vera meira enn rímiligt, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum er limur í fólkakirkjuni*

vera limur ella ikki.

- Men tað er heldur ikki tann vegin, vit hugsa okkum at loysa tann spurningin. Tað er í tillutanini av málsøkjum og landsstýrismanni til málsøkini, at vit kunnu finna eina loysn soleiðis, at tað verður ein limur í fólkakirkjuni, ið fer at umsita kirkjumál, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum.

Hann heldur, at tað er ikki meiri enn rímiligt, at seta fram eitt slíkt krav.

- Men tað skal eingin misskiljing verða við tí. Eg havi einki at seta fingurin á viðvíkjandi arbeiðinum hjá verandi landsstýrismanni í kirkjumálum. Hetta snýr seg als ikki um persónar, men um starvið, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Seta krøv til løgmann

Tá fólkakirkjan verður yvirtikin, fellur alt til løgmann, sum drotningin í dag tekur sær av í kirkjumálum. Og fyri løgmann eins og fyri øll onnur er galdandi, at eingin kann krevja hann at vera lim í fólkakirkjuni. Og júst hetta sær Kaj Leo fyri sær kann gerast ein trupulleiki, ikki sum er, men kanska einaferð í framtíðini.

- Sjálvandi skulu vit sum politikarar ansa eftir tá vit løggeva, at vit ikki løggeva ímóti eitt nú okkara ríkisgrundlóg ella okkara stýrisskipan. Men í hesum førinum er tað rímiligt, at um tað ikki stendur í lógartekstinum, at tað so verður sett í viðmerkingarnar til lógina, soleiðis at vit staðfesta hesa siðvenju frá fyrsta degi uppá sama máta, sum vit í viðmerkingum til lógina vísa á tann søguliga týdning, ið drotningin hevur havt innan føroysku fólkakirkjuna. Vit ynskja, at hon er tilstaðar, tá størri hendingar fara fram innan framtíðar fólkakirkju í Føroyum, sigur Kaj Leo johannesen.

- Fáa vit ein løgmann, ið ikki er limur í fólkakirkjuni, eiga skyldurnar viðvíkjandi kirkjuni latast víðari til varaløgmann. Er hann heldur ikki limur í fólkakirkjuni mugu vit fara víðari í skipanini til avvarandi landsstýrismann, tí eg meti avgjørt tað er rímiligt, at ein landsstýrismaður í kirkjumálum er limur í fólkakirkjuni, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins.

Høgligari fyri báteigarar:

# 75 nýggj bátapláss á Argjum

**Tórshavnar Býráð samtykti í gjárkvøldið at fara undir leingjar av verandi grótkasti, og at gera nýtt grótkast út frá Argjalandinum**

BÁTAPLÁSS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú fer at verða høgligari at eiga bát á Argjum.

Tórshavnar Býráð samtykti í gjárkvøldið at leingja verandi grótkast við 180 metrum, og hetta fer at gera tað kyrrari í bátahylinum á Argjum, enn tað longu er.

Síðani skulu bátabrúgvar leggjast út, so pláss verður fyri 75 bátum aftrat í bátahylinum á Argjum.

Hetta er liður í einari størri útbyggingarætlan fyri smábátapláss í kommununi. Við í ætlanini er eisini at gera grótkast í Álakeri, og verður tann ætlanin til veruleika, fer at verða pláss fyri 150 bátaplássum í Álakeri. Har verður eisini talan um bátabrúgvar.



*Verandi grótkast skal leingjast 180 metrar, meðan eitt nýtt 50 metrar langt grótkast skal gerast út frá Argjalandinum*

Tá eystliga høgættin liggur við vindi, kann hetta geva baksláttur frá Argjalandinum inn í Havnarvág, og royndir, sum Dansk Hydraulisk Institut (DHI) hava gjørt vísa, at um grótkastið á Argjum verður longt 180 metrar so sum tilskilað tekningini, fer hetta eisini at bøta um kyrruna inni á Havnarvág, serliga í Álakeri.

### Kostnaður yvir trý ár

Vanliga er tað Tórshavnar Havn, ið stendur fyri slíkum útbyggingum, men í hesum føri er valt, at flyta fimm milliónir frá Tórshavnar Havn til Tórshavnar Býráð, so at byggingin kann fara í gongd beinanvegin.

– Arbeiðið er mett at kosta 15,5 milliónir. Býráðið hevur gjørt av at seta fimm milliónir av um árið í trý ár fyri at fíggja útbyggingina. Men vit fara kortini at gera alt liðugt nú, sjálvt um fíggingin verður spjeidd yvir trý ár, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Fíggingin verður tikin av kontoini fyri íløgur í smábátahavnir fyri árini 2007, 2008 og 2009.

Fyribils er játtað ein millión til projektering.